

Fótbóltsúrslit

1. deild

NSÍ—KÍ	1—1
B68—B36	3—0
HB—GÍ	1—3
TB—LÍF	1—1

2. deild

SÍ—ÍF	0—2
HB—MB	2—1
Royn—SÍF	4—1
Sumba—Fram	1—0

3. deild

TB—B71	0—2
B68—VB	3—0
KÍ—B36	0—0
HB—EB	4—1

4. deild

Skála—AB	3—1
KÍ—VB	7—2

Unglingar

ÍF—KÍ	1—6

Gentur

B36—VB	2—2
B36—AB	2—0
ÍF—KÍ	1—1

Kvinnur

ÍF—KÍ	1—4
EB—GÍ	0—1

Veddingarúrslit

Veddingarúrslitini frá leikviku 34:

1.	NSÍ—KÍ	x	(1—1)
2.	HB—GÍ	2	(1—3)
3.	B68—B36	1	(3—0)
4.	TB—LÍF	x	(1—1)
5.	Sumba—Fram	1	(1—0)
6.	SÍ—ÍF	2	(0—2)
7.	HB—MB	1	(2—1)
8.	Royn—SÍF	1	(4—1)
9.	TB—B71	2	(0—2)
10.	B68—VB	1	(3—0)
11.	HB—EB	1	(4—1)
12.	KÍ—B36	x	(0—0)

Veddingarseðilin til komandi leikviku skal vera á posthúsinum í seinasta lagi í morgin.

Landskappingin í 2. deild

Í 2. deild varð ein dystur leiktur í Gundadali í Havn leygardagin. Dysturin var millum HB og MB.

Tað kann verða sagt um dystin, at hann var ikki nakað serliga væl leiktur. Í fyrra hálvleiki var tað MB, sum vísti eitt stórt trýst á HB-liðið, men teir vantaðu tó at seta bóltin í netið. MB hevði fleiri góð álop, og nakrar ferðir vóru teir nær við at seta bóltin í netið, men tað eydnaðist teimum tó ikki í fyrra hálvleiki.

Harafturímóti fekk HB tvey mál í fyrra hálvleiki, og báðu ferð var tað Pidde, sum setti bóltin í netið. Seinnu ferð sá út til málið kom nakað óvæntað á málmannin hjá MB, tí hann stóð bert stillur og gjørdi einki fyrr enn ov seint var og bólturin var í netinum.

Men í seinna hálvleiki eydnaðist tað tó MB at fáa eitt mál, sum Trúgvi Fagraberg setti í netið. Men hetta eina málið, sum MB fekk, var ikki nóg mikið at taka nakað stig frá HB, sum vann hendan dystin við tveimum málum móti einum.

Hetta er fyrsti dystur, sum HB hevur vunnið eftir at kappingin byrjaði aftur aftan á summarfrítíðina.

Í Sørvági hevði SÍ vitjan av ÍF. ÍF, sum lá og framvegis liggur á odda í **2. deild trý stig frammanfyri nr. 2, vann dystin** móti SÍ við tveimum málum móti einum ongum.

Tá 8 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, legði Einar Toftegaard ÍF á odda, og 8 minuttir seinni økti Eyðun av Lakjuni um leiðsluna til 2—0, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið av dystinum.

Royn, sum hevur ligið á gáttini til 1. deild nú í fleiri ár, vann eisini sín dyst hetta vikuskiftið, men teir liggja tó framvegis á øðrum plássi trý stig aftan fyri ÍF.

Royn hevði leygardagin vitjan av SÍF úr Sandavági. SÍF kom á odda 1—0, men Royn megnaði at javna út aftur við einum brotssparki, og seinni í fyrra hálvleiki kom Royn upp á 2—1 leiðslu, sum eisini var úrslitið í hálvleikinum.

Og í seinna hálvleiki eydnaðist tað Royn at økja um leiðsluna til 4—1, og var hetta eisini endaliga úrslitið av dystinum. Teir, ið gjørdu málini fyri Royn, vóru Andor Thomsen, Óli Jensen, Vilmund Mikkelsen og Kristin Mikkelsen.

Fram, sum hevði eina sera ringa fyrru helvt av landskappingini og einki stig fekk tá, byrjaði seinnu helvt avbera væl. Tveir teir fyrru dystirnir vunnu teir, men leygardagin eydnaðist tað tó Sumba at steðgja sigursrøðini hjá Fram.

Sumba vann dystin við einum máli móti ongum. Málið kom í fyrra hálvleiki, men tað hevur ikki eydnaðst okkum at fáa uppspurt, hvør gjørdi hetta málið.

Landskappingin í 3. deild:

VB ósigur — B71 á odda

Annað vikuskikftið á rað mistu »favorittarnir« VB stig — B71 vann sín dyst og tók sæti á oddasessinum

Landskappingin í triðju deild gerst alt meira spennandi — og fløkt. VB, sum vit manga ferð í ár hava kosið sum »favorittar« at vinna deildina, tykist at vera komið í leikliga kreppu. Tvey vikuskifti á rað hava »botnliðini« tikið stig frá vágbingum. Fyri viku síðani spældu VB, oddalið, og TB, botnlið, javnleik á vøllinum í Vági og hetta vikuskifti vann B68, ið lá á næstaftasta plássi, við sama stigatali sum tvøramenn, tryggan 3—0 sigur, tá B68 og VB hittust á vøllinum á Svangaskarði leygardagin.

Hetta úrslit er uttan iva komið dátt við hjá mongum veddarum og hevði eisini við sær, at vágbingar duttu burtur av fremsta plássi — týdnigarmikla uppflytingarsessinum.

B71, ið stríðist við VB um sessin, vitjaði nevniliga suðuri á Tvøroyri og vunnu sandoyingar dystin við tveimum málum móti ongum, og løgdu seg sostatt á odda í deildini, eitt stig framman fyri vágbingar.

Í Klaksvík var dystur millum KÍ og B36 og eydnaðist hvørgum av liðunum at fáa mál.

Fjórði dysturin í 3. deild var millum HB og EB og varð spældur í Gundadali og vann HB henda dyst við fýra málum móti einum.

Støðan í 3. deild er nú hon, at fremst er B71 við 14 stigum, meðan VB er næst við 13 stigum. Á triðja sæti finna vit HB, ið hevur 12 stig, meðan hitt havnarfelagið, B36, er nr. Fýra við 11 stigum. Nr fimm er KÍ, ið hevur tryggjað sær 9 stig, meðan EB á sætta plássi hevur átta. Næstaftast liggur B68 við 7 stigum, meðan EB á sætta plássi hevur átta. Næstaftast liggur B68 við 7 stigum, meðan TB liggur einsamalt, »isolerað«, í botninum við 5 stigum.

Næsta vikuskifti hittast B71 og B68, HB og TB, VB og KÍ og EB og B36.

Støðan:

1. deild

B68	10	6	2	2	17—10	14
TB	10	5	3	2	16— 9	13
HB	10	5	3	2	19—15	13
NSÍ	10	2	6	2	15—15	10
GÍ	10	3	3	4	13—16	9
KÍ	10	1	6	3	21—18	8
LÍF	10	2	4	4	13—15	8
B36	10	1	3	6	10—25	5

2. deild

ÍF	10	9	1	0	30—9	19
Royn	10	7	2	1	26—11	16
HB	10	5	1	4	15—15	11
SÍF	10	4	1	5	21—27	9
Sumba	10	4	0	6	14—19	8
MB	10	2	3	5	13—18	7
SÍ	10	2	2	8	10—17	6
Fram	10	2	0	7	11—24	4

3. deild

B71	10	5	2	2	23—12	14
VB	10	6	1	2	31—16	13
HB	10	6	0	4	23—15	12
B36	10	4	3	3	25—24	11
KÍ	10	4	1	5	16—15	9
EB	10	4	1	5	12—22	9
B68	10	3	1	6	18—22	7
TB	10	2	1	7	14—36	5